**AB-B71 0-4 (0-0):**

# FARVÆL, AB

**FÓTBÓLTUR** Fyrri hálvleikur og byrjanin av seinna bendu ikki á, at talan fór at vera um stórsigur nakran veg. Men so raknaði B71 við og gjørdi bart – enntá so hart, at AB nokk ikki reisist aftur í ár

| | |
|---|---|
| AB | 0 |
| B71 | 4 |



Hilmar Jan Hansen

Svarið frá Piotr Krakowski hevur verið tað sama, tá hann nakrar ferðir í síðstuni er blivin spurdur, hvussu stórur møguleikin er fyri, at B71 eisini næsta ár verður at finna í Vodafonedeildini: 99 prosent!

Og hóast tað eina prosentið framvegis restar í, eftir at B71 í gjár vann ein knúsandi 4-0 sigur á AB í botnuppgerðini á Argjum, eru tey 99 prosentini í øllum førum ikki minkað.

Enn hava sandoyingarnir tó framvegis FC Suðuroy at hugsa um, tí soleiðis sum stigatalvan er skrúvað saman í løtuni, kann bara annað av hesum báðum liðunum yvirliva í bestu mansdeildini. Hvat av teimum, tað verður, sæst kanska heima á Sandi sunnudagin, tá FC Suðuroy vitjar.

Hinvegin er lítið at ivast í, at AB noyðist ta tungu gongd niður í 1. deild, tí dysturin í gjár var í veruleikanum seinasti ordiligi møguleikin, skuldi ein dugandi bjargingarætlan fáast at rigga. Vann AB í gjár, høvdu framvegis sjey stig verið upp til hini bæði botnliðini, men teoretiski møguleikin hevði ikki sæð so ómøguligur út, sum hann ger tað nú.

Enn eru 15 stig eftir at spæla um, so framvegis kann nógv henda, men eingin trýr veruliga uppá, at AB skal vinna rest, samstundis sum bæði FC Suðuroy og B71 seta so mikið nógv stig til, at AB kann yvirhála bæði. Tað er nevniliga ikki nóg mikið hjá argjamonnum at fáa bara annað teirra aftur.

### Vendi dystinum

Fyrsti tímin av dystinum inni í Vika í gjár hevði ikki tað stóra upp á seg. Hvørgin parturin hevði nóg mikið av samanhangandi spæli, til at tað kundi spyrjast tað stóra burturúr, og teir hálvu og trýkvartu kjansirnir, ið komu, vóru oftast meira tilvildarligir. AB hevði kanska fleiri atsóknir, men meira broddur var tó í, tá B71 kom framat.

Men so var tað, at Piotr valdi at seta Ebbe Kristin Thomsen inn, og tað broytti dystin fullkomuliga. Sum ein annar »super-sub« gav hann dystinum og B71 nýtt lív, og eftir lítlari løtu var alt vent á høvdið, so tað nú var B71, ið stýrdi slagnum, meðan AB fór burtur í einki.

Sjey minuttir eftir innskiftingina fór Ebbe Kristin ein imponerandi solotúr, tá hann frammi í vinstra króki smeyg sær ímillum tveir argjamenn, rundaði ein ella tveir aftrat inni í brotsteiginum, fyri síðani mestsum at hæla bóltin fram við tí næsta og slapp sær í skotstøðu, áðrenn hann kaldliga sendi bóltin fram við Símun Rógva Hansen í AB-málinum til 1-0. Ein sonn perla!

Tíggju minuttir seinni var hann aftur á rætta staðnum, tá Símun Hansen, ið aftur hesa ferð spældi runt allan vøllin sum ein einmansherur, sendi honum bóltin fyri føturnar, so hann bara skuldi seta høgru innarsíðu á til 2-0. Og bara tríggjar minuttir seinni var tað Ebbe Kristin, sum á líknandi hátt serveraði bóltin fyri føturnar á Símuni, ið kundi økja til 3-0.

### Síðsta útkall fór

Restina av dystinum spældu sandoyingarnir sum eitt av frægaru liðunum, meðan AB ikki líktist sær sjálvum, men heldur einum botnliði í 1. deild. Einki hekk saman hjá argjamonnum, ið ikki høttu tað allarminsta, og skjóta kontraspælið hjá B71 fullkomuliga pilkaði verjuna hjá AB sundur ferð eftir ferð, so sigurin saktans kundi verið nógv størri. Í yvirtíðini fekk Danilo Kovacevic síðsta orðið, tá hann miðvíst fór eftir at skora til 4-0 – og umvegis stongina eydnaðist tað eisini.

Sum dystinum leið, var hugburðurin hjá heimaliðnum fullkomuliga uppgevandi, og spælararnir tóktust vita við sær sjálvum, at her vendist ikki aftur. Teir hingu við høvdinum kring allan vøllin, so øllum stóð greitt, at her var talan ikki bara um trettanda tapið í ár, men um eina niðurflyting, ið gjørdist veruleiki.

Hetta var seinasta útkall hjá AB, sum nú bara skal fáa tey síðstu fimm landskappingarumførini frá hondini, áðrenn farið verður niður. Og hóast B71 fyrst og fremst hevur eyguni við FC Suðuroy, ið bara er trý stig aftanfyri, munnu teir mest bjartskygdu sandoyingarnir skeita við øðrum eyganum uppeftir, har nú bara trý stig eru upp til B68.

*einslistir@kallnet.fo*

## Innskiftarin avgjørdi alt

**Ebbe Kristin Thomsen kom inn, sá og sigraði fyri B71, tá hann skoraði tvey mál og legði upp til eitt triðja í 4-0 sigrinum á AB**

Hilmar Jan Hansen

Í gerandisdegnum selur hann klæði í SMS, tí á visittkortinum stendur handilsleiðari í Jack & Jones. Eitt starv, ið sjálvandi gevur til dagin og vegin, men sum eisini kostar á øðrum økjum, eitt nú eitt fast pláss í byrjunaruppstillingini hjá B71. Soleiðis var 23 ára gamli Ebbe Kristin Thomsen heldur ikki millum teir fyrstu ellivu, ið byrjaðu dystin á Argjum ímóti B71 í gjár, men í seinna hálvleiki kom hann inn og fekk síðsta hálva tíman.

– Eg kann ikki vænta at byrja inni hvørja ferð, tí arbeiðið merkir, at eg missi fleiri venjingar, umframt at ikki var við dystin frammanundan, sum var ímóti B68, tí eg tann morgunin fór í flogfari til Danmarkar at keypa inn til handilin. Men tá so er, so má eg bara vísa, hvør dugur er í mær, tá eg fái møguleikan, sigur Ebbe Kristin.

Í gjár læt hann so sanniliga heldur ikki tann møguleikan fara til spillis, tí fyrst skoraði hann til 1-0 og 2-0, áðrenn hann legði upp til 3-0. Og við sínum ágangandi og avbjóðandi spæli fekk hann veruliga gongd á B71, ið sat á øllum síðsta hálva tíman av dystinum.

– Tað sær næstan út, sum eg trívist best í dystunum ímóti AB, tí øll trý málini, eg havi skotið í ár, havi eg fingið ímóti AB, sigur málskjúttin, ið allar tríggjar dystirnar ímóti argjamonnum hevur verið innskiftari.

Í tí fyrra á Argjum, sum tann 5. apríl endaði við javnleiki 3-3, fekk hann síðstu 12 minuttirnar, og tá liðini hittust inni í Dali á Sandi tann 13. juni, kom hann inn fimm minuttir fyri hálvleik og skoraði avgerandi málið beint fyri steðgin. Tilsamans hevur hann ímóti AB spælt 92 minuttir, ið hava givið honum trý mál og B71 seks týðandi stig.

– Nú eru vit trý stig framman fyri FC Suðuroy, sum má sigast at hava alt trýstið liggjandi á sær. Og nú trúgva vit meira og meira uppá, at vit skulu klára tað, so vit eisini í næsta ár spæla í Vodafonedeildini, sigur Ebbe Kristin Thomsen.